Fylgiskjal 2

Umhvørvis- og vinnumálaráðið

Dagfesting:	XXXXXX
Mál nr.:	22/16183
Málsviðgjørt:	HI
Ummælistíð:	Skrivið frá/til
Eftirkannað:	Lógartænastan dagfestir

Uppskot til

Kunngerð
um
pantskipan fyri íløt

Við heimild í § 2, stk. 1-2 og 5, § 3, stk. 1-6, § 4, stk. 4, § 5, stk. 1-3, § 6, stk. 1-4, § 7, stk. 1 og 2, § 8, stk. 1 og 2, § 9, stk. 1-4 og § 11, stk. 1 í løgtingslóg nr. XX frá XX 2024 um pantskipan fyri íløt, verður ásett:

Íløt fevnd av kunngerðini

§ 1. Henda kunngerðin fevnir um íløt úr metali, plasti og glasi, sum rúma frá 15 sentilitrum og til og við 20 litrum, til hesar vørur:
1) øl fevnt av kapitli 22.03 og 22.02 í toll- og vøruskránni,
2) drykkjuvørur fevndar av kapitli 22.01 og 22.02 í toll- og vøruskránni, t.e. vatn, mineralvatn, sodavatn, orkudrykkir, saft, alkoholfrítt vín o.a.,
3) drykkjuvørur fevndar av kapitli 22.04, 22.05, 22.06 og 22.08, t.e. vín, vermouth, cider, perucider, mjøður, saké, rúsdrekka o.a.,
4) fruktsaft, grønmetissaft o.a. fevnt av kapitli 20.09 í toll- og vøruskránni og 5) óblandaða saft ella annan úrdrátt til leskidrykkir fevnd av kapitli 21.06 í toll- og vøruskránni.
Stk. 2. Er ikki annað ásett, fevnir kunngerðin ikki um:
1) kaggar,
2) plastdunkar, sum rúma meira enn 10 litrum, til vatn, kelduvatn og mineralvatn uttan kolsýru,
3) íløt, sum rúma meira enn 4,9 litrum, til vøru fevnda av stk. 1, nr. 5. og
3) íløt til drykkir, sum innihalda mjólk ella mjólkúrdráttir.

Allýsing

§ 2. Í hesi kunngerðini skulu hesi hugtøkini skiljast soleiðis:

1) Framleiðari: Ein, sum í Føroyum letur vøru fevnda av § 1 í íløt fevnd av § 1 til sølu ella avhendingar.
2) Góðkend móttøka: Móttøka fyri íløt fevnd av § 1, sum landsstýrisfólkið hevur góðkent sambært § 9, stk. 4 og 5, og sum ikki er eitt sølustað ella ikki er staðsett hjá einum sølustað.
3) Innflytari: Ein, sum flytur inn vøru fevnda av § 1 í ílati fevndum av § 1.
4) Pantumsitari: Tann, sum landsstýrisfólkið við heimild í § 3 í løgtingslóg um pantskipan fyri íløt hevur litið til at umsita og reka pantskipanina sbr. § 3.
5) Rakstrargjald: Gjald fyri allar útreiðslur, sum pantumsitarin hevur av pantskipanini, t.d. til íløgur, viðlíkahald, umsiting, rakstur, leigu av leysafæ og fastogn, flutning, kunningarátøk og grannskoðan. Sambært løgtingslógini § 4, stk. 1 og 2, gjalda innflytarar og framleiðarar pantumsitaranum rakstrargjald fyri hvørt ílat fevnt av pantskipanini sambært løgtingslógini gjøgnum TAKS. Rakstrargjaldið fyri hvørt ílatið verður ásett sambært reglunum í § 12.
6) Sølustað: Har vørur fevndar av § 1 verða seldar brúkarum í íløtum fevndum av § 1.

Pantumsitari

§ 3. L/F Interkommunali Renovatiónsfelagsskapurin, IRF, umsitur og rekur pantskipanina

Rindan av pantvirði

§ 4. Sølustøð og góðkendar móttøkur skulu rinda viðskiftafólki pantið sambært løgtingslógini § 2, stk. 3, tá ið tikið verður ímóti íløtum fevndum av § 1, sum eru skrásett sambært § 7, stk. 2. Eitt sølustað kann ikki krevja, at pantið verður brúkt til keyp á sølustaðnum.
Stk. 2. Tað er ein treyt fyri at fáa pantið rindað, at ílatið er í so frægum standi, at fløskuautomatir góðkendar sambært § 10 stk. 3, kunnu handfara tað og lesa strikukoduna. Hjá sølustøðum við ongari fløskuautomat skulu appir ella skannarar, sum eru góðkend sambært § 10, stk. 3, kunna lesa strikukoduna av.

Kunning um pantvirðið

§ 5. Sølustøð skulu á prísskeltum, kvittanum, rokningum og lýsingum kunna um pantið sambært løgtingslógini § 2 stk. 3.
Stk. 2. Øll, sum selja ella avhenda sølustøðum vøru fevnda av § 1, skulu kunna sølustøðini um pantið á íløtunum.

§ 6. [strikað]

Skráseting av framleiðara, innflytara og íløtum

§ 7. Framleiðarar og innflytarar skulu skráseta seg hjá pantumsitaranum við navni, bústaði og vinnutali, áðrenn teir kunnu selja ella avhenda íløt fevnd av § 1 í Føroyum.
Stk. 2. Áðrenn framleiðarar ella innflytarar kunnu selja ella á annan hátt avhenda íløt fevnd av § 1, skulu teir hava skrásett íløtini hjá pantumsitaranum. Skrásetingin er framd, tá ið pantumsitarin hevur váttað hana. Skrásetast skulu strikukodan á ílatinum, hvørjum tilfari ílatið er úr, støddin á ílatinum og navnið á vøruni.
Stk. 3. Pantumsitarin kann biðja um fleiri upplýsingar enn tær í stk. 1 og 2 nevndu.
Stk. 4. Tá ið pantumsitarin krevur tað, skulu framleiðarar og innflytarar veita skjalprógv fyri upplýsingum um seg sjálvar ella íløtini. Pantumsitarin kann sýta fyri skráseting sambært stk. 1 og 2 til skjalprógv eru veitt.
Stk. 5. Framleiðarar og innflytarar skulu lata pantumsitaranum upplýsingarnar at skráseta í tí líki og á tann hátt, sum pantumsitarin krevur.
Stk. 6. Pantumsitarin kann strika ein innflytara ella framleiðara, sum er skrásettur sambært stk. 1, um viðkomandi

annaðhvørt biður um at verða strikaður, er strikaður úr skrásetingini hjá Skráseting Føroya ella ikki innan fýra vikur hevur svarað einum fyrispurningi frá pantumsitaranum, um hann framvegis vil vera skrásettur.
Stk. 7. Verður ein framleiðari ella innflytari strikaður, sbr. stk. 6, verða íløtini, sum eru skrásett hjá viðkomandi, somuleiðis strikað sum verandi knýtt at viðkomandi.

Undantøk frá móttøkuskyldu og móttøkutíðir

§ 8 Landsstýrisfólkið kann í serligum førum, og í ávíst tíðarskeið, geva undantak frá fullari móttøkuskyldu sambært løgtingslógini § 5, stk. 1.
Stk. 2. Sølustøð skulu taka ímóti íløtum í minsta lagi átta tímar um vikuna í upplatingartíðini. Góðkendar móttøkur og sølustøð við góðkenning sambært § 9, stk. 3, skulu taka ímóti íløtum í minsta lagi 30 tímar um vikuna.
Stk. 3. Tímakrøvini sambært stk. 2 skulu lúkast millum kl. 07:00 og kl. 22:00 og í minsta lagi ein tíma í senn. Landsstýrisfólkið kann í serligum førum veita undantak frá krøvunum sambært stk. 2 og 3.
Stk. 4. Sølustøð og góðkendar móttøkur skulu á sjónligum stað kunna um sínar móttøkutíðir.
Stk. 5. Tímakrøvini sambært stk. 2 falla burtur, um sølustaðið ella góðkenda móttøkan vegna halgidag, almennan frídagur ella onnur viðurskifti hevur stongt á einum degi, har sølustaðið ella góðkenda móttøkan annars hevði havt opið og tikið ímóti íløtum.
Stk. 6. Sølustøð hjá bryggjaríum, sum hava loyvi at selja vøru fevnda av løgtingslóg um innflutning og sølu av rúsdrekka hava, eftir fráboðan til pantumsitara, bara skyldu at taka ímóti íløtum fevndum av § 1, sum tey sjálv selja. Sølustað, sum gevur fráboðan sambært 1. pkt. má sjálvt syrgja fyri og gjalda flutningin av íløtum til pantumsitaran.
Stk. 7. Hesi sølustøðini fevnir løgtingslógin § 5 stk. 1 ikki um:

1) matstovur,
2) barrir,
3) kaffistovur,
4) móttøkur á hotellum, venjingarmiðstøðum og tílíkum,
5) pylsuvognar og aðrir matvognar,
6) sølustøð við loyvi at selja rúsdrekka við meira enn 5,8 rúmprosentum av alkoholi á framleiðslustaðnum,
7) sølustøð, sum vanliga ikki ella bara í sera avmarkaðan mun selja matvørur og bara selja heilt fáar vørur fevndar av § 1, t.d. amboðshandlar, timburhandlar og venjingarmiðstøðir,
8) bakarí, sum í høvuðsheitum ikki selja annað enn bakstur, og
9) sølubúðir til hissinissølu í sambandi við eitt nú bygdarstevnur, ítróttatiltøk, tónleikatiltøk og sølustevnur.

Stk. 8. Valdar ivi, ger landsstýrisfólkið av, um eitt sølustað er fevnt av stk. 7.

Móttøkur og samstarv um móttøku av íløtum

§ 9. Sølustøð kunnu samstarva um felags móttøku av íløtum, so at eitt sølustað, sum landsstýrisfólkið hevur góðkent, tekur ímóti íløtum fyri sínar samstarvsfelagar og hesir verða undantiknir móttøkuskylduni sambært løgtingslógini § 5, stk. 1. Sølustøð verða somuleiðis undantikin móttøkuskylduni sambært løgtingslógini § 5, stk. 1, um tey samstarva við eina góðkenda móttøku, sbr. stk. 4 og 5.
Stk. 2. Fyri at verða undantikin móttøkuskylduni sambært løgtingslógini § 5, stk. 1, skulu sølustøð á sjónligum stað kunna um, hvønn samstarv er fingið í lag við sambært stk. 1.
Stk. 3. Góðkenning av felags móttøku sambært stk. 1 er treytað av, at treytirnar í reglugerðini hjá pantumsitaranum um staðseting, hølis- og atkomuviðurskifti, maskinur, tólbúnað og ritbúnað eru loknar.

Stk. 4. Landstýrisfólkið góðkennir móttøkur, sum ikki eru sølustøð ella ikki eru staðsettar hjá sølustøðum.
Stk. 5. Góðkenning av móttøku sambært stk. 4, er treytað av, at treytirnar í reglugerðini hjá pantumsitaranum um staðseting, hølis- og atkomuviðurskifti, maskinur, tólbúnað og ritbúnað eru loknar.
Stk. 6. Samstarv sambært stk. 1 kann bara fara fram innan fyri samstarvsøkini sambært fylgiskjali 1. Landsstýrsifólkið kann í serligum førum loyva samstarvi tvørtur um samstarvsøkini sambært fylgiskjali 1.

Handfaring av íløtum

§ 10. Pantumsitarin syrgir fyri, at íløt fevnd av § 1 verða heintað hjá sølustøðum við móttøkuskyldu og hjá góðkendum móttøkum. Íløt skulu heintast so regluliga, at tey ikki rúgvast upp hjá tí einstaka sølustaðnum ella tí góðkendu móttøkuni.
Stk. 2. Innflytarar og framleiðarar kunnu lata pantumsitaranum íløt beinleiðis sambært avtalu.
Stk. 3. Pantumsitarin ásetur í reglugerð, sum landsstýrisfólkið góðkennir, hvussu íløt skulu handfarast, eisini krøv til maskinur, ritbúnað og tólbúnað, og kunnar sølustøð, góðkendar móttøkur og avtalupartar sambært stk. 2 um ásettar reglur. Sølustøð og góðkendar móttøkur kunnu sambært avtalu við pantumsitaran kroysta íløt á staðnum og avrokna beinleiðis við pantumsitaran við dátufráboðan, um treytirnar fyri hesum sambært reglugerðini í 1 pkt. eru loknar.
Stk. 4. Eru íløt ikki handfarin samsvarandi reglugerðini hjá pantumsitaranum, sbr. stk. 3, kann pantumsitarin sýta fyri at taka ímóti ella heinta íløtini, til viðurskiftini eru fingin í rættlag.
Stk. 5. Pantumsitarin kann krevja gjald fyri kassar, íløt og posar, sum nýtast skulu til at handfara íløt sambært reglugerðini hjá pantumsitaranum, sbr. stk. 3. Gjaldið skal samsvara við kostnaðin.
Stk. 6. Pantumsitarin rindar gjaldið sambært stk. 5 aftur, tá ið kassin, ílatið ella posin er fingin pantumsitaranum aftur.

Avrokning við pantumsitaran

§ 11. Pantumsitarin skal rinda sølustøðum, góðkendum móttøkum, framleiðarum og innflytarum pantið sambært løgtingslógini § 2, stk. 3, á íløtum fevndum av § 1, sum hann hevur heintað ella tikið ímóti sambært § 10, stk. 1 og 2, og sum eru skrásett sambært § 7, stk. 2.
Stk. 2. Pantvirðið verður bara rindað, um strikukodan er í so frægum standi, at útbúnaður, sum lýkur krøvini í reglugerðini sambært § 10, stk. 3, kann lesa hana. Undantikin eru sølustøð og góðkendar móttøkur, sum eftir avtalu við pantumsitaran um at kroysta íløt á staðnum og avrokna beinleiðis við pantumsitaran við dátufráboðan sambært § 10, stk. 3, 2. pkt.
Stk. 4. Er ósamsvar millum uppteljingina av íløtum hjá sølustað ella góðkendari móttøku og uppteljingina hjá pantumsitaranum, verður pantið rindað við støði í uppteljingini hjá pantumsitaranum.

Áseting av rakstrargjaldi

§ 12. Áðrenn nýtt rakstrargjald kann ásetast, skal pantumsitarin senda skrásettum innflytarum og framleiðarum eina frágreiðing um gongdina, síðan rakstrargjald seinast varð ásett, eina rakstrarætlan fyri tíðarskeiðið, til rakstrargjaldið væntandi aftur verður dagført, og uppskotið til áseting av nýggjum rakstrargjaldi til ummælis. Ummælisfreistin er ein mánað.
Stk. 2. Pantumsitarin ger í minsta lagi eina ferð um árið uppskot til nýtt rakstrargjald sambært stk. 1.
Stk. 3. Landsstýrisfólkið ásetur nýggja rakstrargjaldið við støði í uppskotinum til nýtt rakstrargjald sambært stk. 1 og ummælunum frá innflytarum og framleiðarum sambært stk. 1 og boðar pantumsitaranum frá tí ásetta

rakstrargjaldinum, og nær tað kemur í gildi.
Stk. 4. Pantumsitarin boðar skrásettum framleiðarum, innflytarum og TAKS frá tí ásetta rakstrargjaldinum sambært stk. 3.
Stk. 4. Avlop av sølu av tilfari frá íløtum og avlop av vantandi returpanti skulu nýtast til útreiðslur, sum pantumsitarin hevur av pantskipanini.
Stk. 5. Rakstrargjaldið er 50 oyru fyri hvørt ílatið fevnt av § 1 frá degnum, tá ið henda kunngerðin kemur í gildi, til nýtt rakstrargjald er komið í gildi sambært stk. 3.

Afturbering av panti og rakstrargjaldi

§ 13 Pantumsitarin kann eftir umbøn bera framleiðarum og innflytarum pantvirðið og rakstrargjaldið fyri íløt fevnd av § 1 aftur, um skjalprógvast kann, at íløtini eru útflutt ella seld ella avhend til proviant ella tollfría sølu, og at tað er ósannlíkt, at íløtini enda aftur í pantskipanini.
[Orðingin í hesi ásetingini er fyribils og verður endaliga avgjørd, tá treytirnar fyri afturbering eru avráddar við framleiðarar og innflytarar, sí meira um hetta í viðmerkingunum í løgtingslógini til § 4 stk. 4]

Kæra

§ 15. Avgerðir sambært hesi kunngerðini kunnu kærast til landsstýrisfólkið. Kærufreistin er fýra vikur frá degnum, tá ið kærarin hevur fingið fráboðan um avgerðina.

Revsing

§ 16. Brot á § 4, stk. 1, § 7, stk. 1-2, § 8, stk. 2-4, verða revsað við sekt.
Stk. 2. Revsiábyrgd kann verða áløgd løgfrøðiligum persónum sambært reglunum í 5. kapitli í revsilógini.

Gildiskoma

§ 18. Henda kunngerðin kemur í gildi 1. oktobur 2025


Umhvørvis- og vinnumálaráðið, dagfesting.

Ingilín Strøm
landsstýrisfólk

/ Pól E. Egholm

Fylgiskjal 1

Samstarvsøkir



Øki		**Kommunur**
Øki 1	Norðoyggjar	Viðareiðis, Fugloyar, Hvannasunds, Kunoyar, Klaksvíkar
Øki 2	Eysturoy og Sunda Kommuna	Sunda, Eiðis, Fuglafjarðar, Eystur, Runavíkar, Sjóvar, Nes
Øki 3	Streymoy (minus Sunda kommunu)	Vestmanna, Kvívíkar, Tórshavnar
Øki 4	Vágar	Vága, Sørvágs
Øki 5	Sandoy	Skopunar, Sands, Skálavíkar, Húsavíkar, Skúvoyar
Øki 6	Suðuroy	Hvalbiar, Tvøroyrar, Fámjins, Hovs, Porkeris, Vágs, Sumbiar